UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **20. apríl 2022**
Tygara ref**.:**
Máltal**.: 21/08502-97**

**Svar**

**upp á**

**§ 52a fyrispurning nr. 52-164/2021 um starvsnormeringar hjá námsfrøðingum í fólkaskúlanum, frá Djóna Nolsøe Joensen, løgtingsmanni, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv tað vildi kostað mánaðarliga at sett námsfrøðingar í føstum starvi, sum arbeiða á serdeildunum á fólkaskúlaøkinum, í fult starv við setanarbroti á 1,0?

2. Heldur landsstýrismaðurin, at tað er rímiligt, at fast settir námsfrøðingar á serdeildum í fólkaskúlanum hava lægri setanarbrot samanborið við líknandi námsfrøðingar á miðnámsskúlaøkinum?

3. Kann landsstýrismaðurin greiða frá og grundgeva fyri, hví setanarbrotið hjá námsfrøðingum á fólkaskúlaøkinum er væl lægri enn setanarbrotið á miðnámsskúlaøkinum, tá talan er um serdeildir?

4. Ætlar landsstýrismaðurin at skipa viðurskiftini soleiðis, at námsfrøðingar á serøkinum í fólkaskúlanum verða settir í fult starv við einum setanarbroti á 1,0 og fáa eins setanarviðurskifti sum námsfrøðingarnir, sum virka á serdeild á miðnámsskúlaøkinum?

**Svar**

**Til 1:** Mánaðarliga vildi tað í eyka lønarútreiðslum kostað umleið 200.000 kr., um allir námsfrøðingarnir í sertilboðunum á fólkaskúlaøkinum vóru settir í føstum starvi við setanarbroti á 1,0.
Her í apríl 2022 eru tað 25 námsfrøðingar í føstum starvi í teimum 9 sertilboðunum í fólkaskúlanum. Høvdu øll hesi í dag verið sett við setanarbroti á 1,0, so hevði tað havt við sær eina øking á 5,3 ársverk, sum svarar til ein eyka kostnað á umleið 2,5 mió. kr. árliga. Hetta er grundað á ein miðal kostnað á 475.000 kr. árliga fyri hvørt ársverk. Fer serøkið at vaksa komandi tíðina við øktum næmingatølum í sertilboðunum, so fer lønarútreiðslan við slíkari umlegging at verða enn hægri.

**Til 2:** Setanarviðurskiftini hjá ymsu starvsbólkunum hava verið ásett soleiðis síðan skipanin byrjaði. Tað verður ikki raðfest í løtuni at broyta verandi skipan viðvíkjandi áseting av setanarbroti hjá námsfrøðingum á fólkaskúlaøkinum.

**Til 3:** Tá serøkið varð umskipað við serflokkum í ávísum skúlum kring landið, varð gingið út frá, at ein setan á 0,85 hjá námsfrøðingum var tað, ið metast kundi vera rímiligt. Hetta grundað á, at skúladagurin í serflokkum er avmarkaður sambært kunngerð til at vera á leið frá kl. 8.00 – 13.00. Skipanin við fastari fyrireikingartíð til hvønn undirvísingartíma, sum lærarar hava, er ikki galdandi fyri námsfrøðingar. Altso er ein munur á starvsliga innihaldinum hjá námsfrøðingum og hjá læraranum. Á serbreytunum á miðnámsskúlunum hava øll starvsfólk uttan mun til útbúgving somu starvstreytir og ábyrgd. Tað merkir, at námsfrøðingar á jøvnum føti við lærarar fyrireika og standa fyri undirvísingini. Í serbreytunum á miðnámsøkinum er tað leiðsla skúlans, sum ger av, hvussu nógv tíð skal til fyrireiking, uppfylging og annað, sum part av arbeiðstíðini.

**Til 4:** Landsstýrismaðurin hevur í løtuni ikki ætlanir um at raðfesta broyting viðvíkjandi starvsbroti hjá námsfrøðingunum á fólkaskúlaøkinum.

Vinarliga

Jenis av Rana
*landsstýrismaður*